**Hoyringsskriv, broytingaruppskot til Elveitingarlógina**

Við hesum loyvir Maskinmeistarafelagið sær at koma við nøkrum viðmerkingum til ætlaðu broytingarnar í Elveitingarlógini – Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita).

--

Í Maskinmeistarafelagnum hava vit forstáilsi fyri, at tillagingar og dagføringar javnan mugu gerast í lógar- og regluverkinum, sum regulerar okkara orkuframleiðslu og orkuveiting. Serliga er tað helst neyðugt við júst elveitingarlógini, tí tað eru fleiri ár síðan nú, at landsmyndugleikin og SEV tóku lógvatak um at elektrifisera orkunýtsluna á landi, og at hon skal verða 100 prosent grøn í 2030.

Skiftandi landsstýri hava hildið fast um hesa avgerð, tó at onkur helst er farin at ivast í, um tað ber til at halda tíðarfreistina. Í hvussu er, er orðingin eitt sindur linari í lógaruppskotinum, sum ætlanin er at leggja fyri tingið, enn hon onkuntíð hevur verið – nú stendur, at "Landsstýrið og SEV ynskja, at arbeitt verður miðvíst fram ímóti, at elframleiðslan úr varandi orkukeldum verður økt munandi komandi árini, so at málið um 100 % grøna elframleiðslu kann røkkast í 2030 **ella skjótast gjørligt** (okkara herðing)."

Í Maskinmeistarafelagnum hava vit tó virðing fyri gylta málinum og eisini fyri, at realitetirnir í einari tilgongd til eitt so umfatandi orkuskifti kunnu gera tað neyðugt at justera bæði ambitiónir og tíðarhorisont.

Men vit ivast stórliga í, at aktuella uppskotið um dagførda elveitingarlóg víðkað við ásetingunum um fjarðhitaframleiðslu og -veiting er rætta amboðið at røkka málinum. Hinvegin halda vit, at uppskotið, um tað verður samtykt, heldur fer at niðurlaða SEV, sum vit kenna tað í dag.

SEV er í dag eitt væl rikið orkufelag, sum hevur neyðugu styrkina at røkja sína allarfremstu kjarnuuppgávu, nevniliga at veita støðugan streym til húsarhald, vinnu, almennar stovnar, aðrar tænastuveitarar o.s.fr fyri sama prís um alt landið.

SEV megnar við øðrum orðum veitingarskylduna, men lógaruppskotið setur hana av álvara í vanda, og tí kunnu vit, sum tað yrkisfelagið, ið umboðar størsta partin av fakligu arbeiðsmegini hjá orkufelagnum, ikki viðmæla, at uppskotið verður samtykt í verandi líki. Tað undrar okkum ikki sørt, at Maskinmeistarafelagið ikki var millum teirra, ið serstakt fingu sent uppskotið til ummælis. Gott er kortini, at uppskotið bleiv lagt á hoyringsportalin hjá Løgmálaráðnum.

Tað eru nógv viðurskifti, ið vit halda byggja undir okkara niðurstøðu. Ov drúgt verður at greiða frá øllum okkara sjónarmiðum og smálutum í hesum skrivi, og vit vóna tí at verða boðin til hoyring í nevndarviðgerðini, eftir at uppskotið er lagt fyri Løgtingið.

Grundleggjandi eru vit tó samd við teimum, ið hava skýrt fyriliggjandi ætlan at vera eina de facto privatisering av stórum parti av virkseminum, sum SEV hevur í dag. Latið verður upp

fyri, at aðrir aktørar kunnu framleiða streym til egna nýtslu. Í § 5, stk. 4 í verandi lóg skal tað gaman í leggjast afturat, at "... avlopsorka frá elframleiðslu til egna nýtslu, kann leiðast inn á elnetið", men í nýggja kapitlinum 3b um keyp og sølu av el stendur í § 15 g, at "SEV keypir og selir elorku, ið verður flutt á elnetinum hjá SEV. Sølan fer fram í heilsølu ella smásølu."

Hetta skilja vit soleiðis, at SEV skal binda seg til at keypa møguliga avlopsorku frá teimum, ið annars framleiða til egna nýtslu. Er nógv avlopsorka frá eksternum framleiðarum, kemur eginframleiðslan hjá SEV tískil í aðru røð. Ein sovorðin marknaðarmekanisma ávirkar ikki brúkaraprísin niðureftir; tvørturímóti.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður upp í saman vissað um, at SEV framhaldandi eigur elkervið og varðar av skipanarberandi tænastum – tað, sum vanliga verður rópt "systemisk ábyrgd". Og landsstýrisfólkið kann seta treytir og skal góðkenna tað mesta av tí nýggja, sum latið verður upp fyri. Millum annað skal landsstýrisfólkið góðkenna fíggjarætlanina hjá SEV.

At SEV framhaldandi er eigari av elkervinum og hevur systemisku ábyrgdina, halda vit ikki vera nakra trygd fyri vanliga elbrúkaran, tá tað samstundis verður máað undan fíggjarliga grundarlagnum hjá orkufelagnum og systemiska ræðinum á orkuframleiðslu og orkuveiting.

At landsstýrisfólkið fær víðkaðar heimildir at seta treytir á einum liberaliseraðum orkumarknað og góðkenna fíggjarætlanina hjá SEV er eftir okkara fatan heldur ikki nøkur trygd fyri brúkaran, men tvørturímóti letur upp fyri, at treytirnar fyri hesum marknað fara at vera ymiskar alt eftir, hvør stjórn situr við valdið.

Tað er sjálvsagt upp á tíðina, at vit fáa eina fjarðhitalóggávu í Føroyum, tí vit hava onga frammanundan, men vit halda als ikki, at tað er skilagott at spleysa fjarhitan upp í elveitingarlóggávuna bara tí, at fjarhiti eisini er orka, sum verður flutt ígjøgnum orkuleiðingar. Allur problematikkurin rundan um liberaliseringina av elframleiðsluni og -veitingini verður gruggaður at, at fjarhitalóggávan verður fløkt uppí. Fjarhitaskipanin, sum vit kenna hana frá høvuðsstaðnum, ber í dag brá av tvingsli, og við at flætta regluverkini saman, er vandi fyri, at tað sama hendir við elveitingini.

Sum nevnt eru vit fús at koma til hoyring undir nevndarviðgerðini av uppskotinum, og kunnu vit tá greiða nærri frá okkara sjónarmiðum og útgreina okkara ivamál.

Tórshavn 24. Januar 2024

Vegna Maskinmeistarafelagið

Arnfinn Bech, formaður